Uttanríkis- og mentamálaráðið

Dagfesting:	9. desember. 2025
Mál nr.:	23/01930
Málsviðgjørt:	AAH
Ummælistíð:	19.9-20.10.2025
Eftirkannað:	26.11.2025

Uppskot til

Løgtingslóg
um
at seta bindandi veðurlagsmál
(Veðurlagslógin)

§ 1. Við hesi løgtingslóg verða bindandi veðurlagsmál sett fyri Føroyar, so at vit kunnu viðvirka til at:
1) tálma alheims hitaøkingini vegna útlát av vakstrarhúsgassi,
2) tálma negativu avleiðingunum fyri lívfrøðiligt margfeldi og vistskipanir á landi og sjógvi,
3) betra um møguleikarnar hjá fólki og samfeløgum umframt djóralívi og plantulívi at standa ímóti og laga seg til veðurlagsbroytingar, og
4) tryggja okkum og komandi ættarliðum javnbjóðis kor at liva og virka undir, bæði á landi og sjógvi.

Stk. 2. Veðurlagsmál Føroya skulu stigvíst flyta Føroyar yvir í ein reinorkubúskap, so at øll framleiðsla og alt virksemi verður loyst frá olju og steinrunnum úrdráttum, ið hava við sær útlát av vakstrarhúsgassi.

§ 2. Í 2050 skal útlátið av vakstrarhúsgassi frá virksemi undir føroyskum løgdømi á landi og sjógvi verða netto null.

§ 3. Fyri at røkka langtíðarmálinum í § 2verða tíðarfestar virkisætlanir við ítøkiligum átøkum at minka um útlátið av vakstrarhúsgassi komandi 10 árini gjørdar fimta hvørt ár.
Stk. 2. Tíðarfestu virkisætlanirnar og ítøkiligu málini um minking av útlátinumskulu gerast alsamt meiri framsøkin, hvørja ferð tey verða sett.
Stk. 3. Útlátið av vakstrarhúsgassi skal roknast í mun til føroyska útlátið av vakstrarhúsgassi, sum tað var ár 2010.

§ 4. Landsstýrisfólkið samskipar, vegna landsstýrið, arbeiðið at røkka bindandi veðurlagsmáli Føroya.
Stk. 2. Landsstýrisfólkið ráðførir seg við týðandi áhugapartar, hvørja ferð ein virkisætlan verður dagførd.

§ 5. Skipað verður eitt óheft veðurlagsráð við serfrøðingum, sum skal:
1) gera tilmæli til landsstýrisfólkið um val og vavi av átøkum, sum vera mett neyðug og hóskandi fyri at røkka bindandi veðurlagsmáli Føroya,

2) varskógva landsstýrið, tá mett verður, at átøk ikki hóska ella røkka, eitt nú tí at fortreytir, tøkni ella aðrar umstøður í samfelagnum ella í umheiminum eru munandi broyttar, og
3) luttaka í almennum kjaki og varpa ljós á veðurlagsbroytingar.

Stk. 2. Í veðurlagsráðnum sita minst trý og í mesta lagi fimm umboð við hollum førleikum innan veðurlagsøkið. Landsstýrisfólkið velur umboðini fyri fýra ár í senn eftir tilmæli frá Fróðskaparsetri Føroya.

Stk. 3. Veðurlagsráðið ásetir sjálvt sína starvsskipan, sum landsstýrisfólkið góðkennir. Umhvørvisstovan veitir veðurlagsráðnum skrivstovuhald.

§ 6. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Føroyar hava tikið undir við altjóða Veðurlagssáttmálanum frá 1992 og við Parísavtaluni frá 2015. Bæði sáttmálin og avtalan leggja áherðslu á, at øll lond, eftir førimuni, eiga at gera sítt til at minka útlátið av vakstrarhúsgassi, so at hitaøkingin av jørðini kann steðga innan aldamótið. Bara soleiðis kunnu vit viðvirka til at tálma negativu avleiðingunum av veðurlagsbroytingum.

Sambært nýggjastu frágreiðingini frá IPCC, International Panel on Climate Change hjá Sameindu Tjóðum, ST, hevur mannaskapta hitaøkingin longu elvt til ógvusligar broytingar í veðurlagnum. Staðfest er eisini, at veðurlagsbroytingar raka ymiskt kring heimin, men felags er, at tær longu hava umfatandi avleiðingar fyri liviumstøðurnar hjá fólki, djóralív og plantulív á landi og sjógvi, náttúrutilfeingi, vistskipanir, landbúnað, fiskivinnu o.a. Higartil eru tað økini í Arktis, við ekvator og láglendi kring heimin, sum eru harðast rakt. Ásannast má, at veðurlagsbroytingarnar gerast alsamt meiri eyðsýndar á ymsan hátt í øllum heimspørtum.

ST hevur við frágreiðingum og greiningum frá IPCC sum heimildargrundarlag fleiri ferðir víst á, at jú fyrr útlátið av vakstrarhúsgassi minkar, tess størri sannlíkindi eru fyri, at tað ber til at tálma og steðga hitaøkingini og oyðileggjandi avleiðingunum fyri fólk og samfeløg, lívfrøðiligt margfeldi og vistskipanir á landi og sjógvi, sum eru tilverugrundarlagið hjá mannaættini, óansæð hvar í heiminum vit búgva ella virka. Verður farið væl útum ár 2030, áðrenn útlátið í alheims-høpi veruliga byrjar at minka, eru vánaútlit fyri, at hitaøkingin kann haldast niðanfyri 1,5-2 stig í hesi øldini. Fleiri vilja vera við, at hitaøkingin tá fer at verða 2-3 stig ella meira, og tá væntast avleiðingarnar av veðurlagsbroytingunum at verða uppaftur ógvusligari.

Umráðandi er tí, at øll lond eftir førimuni taka samábyrgd fyri at minka útlátið av vakstrarhús-gassi sambært meginreglunum í Veðurlagssáttmálanum og Parísavtaluni. Ráðandi heimssemja er um, at ríku og mentu londini, sum søguliga hava verið atvoldin til nógv tað mesta útlátið av vakstrarhúsgassi og íkomnu støðuna, eisini eru tey londini, sum skulu minka útlátið mest og skjótast. Hesi lond skulu tí ganga á odda í stríðnum móti veðurlagsbroytingum og eisini hjálpa menningarlondum fram á leið við førleikamenning, tøkni, fígging og endurgjaldi, orkuskifti o.tíl., so teirra samfelagsmenning ikki fer at byggja á steinrunnin brennievni, gamla tøkni osfr.

Føroyar teljast millum ríku og tøkniliga framkomnu londini og tí hava vit bundið okkum til at vera við í fremstu rað at skerja útlátið av vakstrarhúsgassi. Í løtuni er árliga nýtslan av olju umleið 300.000 tons, og okkara útlát av vakstrarhúsgassi er farið uppum 1 mió. tons CO2-eindir. Føroyar hava fíggjarorku, førleikar og góðar fortreytir fyri at gera stórar og skjótar minkingar í útlátinum av vakstrarhúsgassi. Tað er eftir førimuni, at heimsins lond verða vigaði og mett. Við Parísavtaluni mugu vit ganga á odda at minka útlátið av vakstrarhúsgassi fyri at tálma ógvusligum veðurlagsbroytingum, sum stava frá upphitingini av jørðini.

Tí verður hetta lógaruppskot lagt fram fyri at fáa undirtøku frá Løgtinginum til at áseta bindandi veðurlagsmál fyri Føroyar í samsvari við Veðurlagssáttmálan og Parísavtaluna. Ítøkiliga verður langtíðarmálið um netto null útlát ár 2050, lógarfest. Komandi 25 árini mugu brúkast til at røkka málinum á ein samfelagsliga skynsaman hátt, har mest fæst fyri hvørja krónu í orkuskiftinum. Hetta skal síggjast aftur í tíðarfestum virkisætlanum, sum skulu ásetast fimta hvørt ár.

1.2. Galdandi lóggáva

Ongin lóg er á økinum frammanundan. Føroyar hava tó í tveimum førum við løgtingssamtykt sett ítøkilig mál at minka útlátið av vakstrarhúsgassi. Fyrru ferð í 2009 við veðurlagspolitikki Føroya 2010-2020 og seinnu ferð í 2022 við orku- og veðurlagspolitikkinum fyri árini 2022-2032 . Í báðum førum eru fleiri átøk sett í verk at minka útlátið av vakstrarhúsgassi og at broyta viðurskifti í samfelagnum, so at okkara framleiðsla og virksemi gerast minni tongd at olju. Summi átøk eru framd við lóg og kunngerð, meðan onnur hava verið av umsitingarligum slagi.

Síðani partalondini til veðurlagssáttmálan samtyktu løgfrøðiliga bindandi Parísavtaluna, hava fleiri lond valt at samtykkja sonevndar veðurlagslógir. Mett verður, at ein veðurlagslóg leggur størri bindingar á politisku skipanina, enn politiskar samtyktir av øðrum slagi. Orsøkin er, at lógir eru løgfrøðiliga bindandi, hóast tær t.d. ikki innihalda revsiheimildir.

Verður hugt at fyrra veðurlagspolitikkinum, galdandi árini 2010-2020, vóru umleið 9 ítøkilig átøk sett í verk, men málið um minst 20 prosent minking í útlátinum varð ikki rokkið. Vaksandi búskaparvøkstur við øktum fiskiskapi, serliga eftir sild og makreli, vøkstur innan laksaaling og annað virksemi hevur, saman við fólkavøkstri, elvt til, at útlátið helt fram at vaksa, hóast ávís átøk vóru sett í verk. Hetta vísir, at virksemið og búskaparvøksturin hjá okkum framvegis er neyvt bundin at oljunýtslu.

Í 2015 vann SEV norðurlendsku umhvørvisvirðisløninа fyri at seta framsøkið mál um, at ár 2030 skuldi øll elframleiðslan stava frá varandi orkukeldum og ikki úr olju. Eitt mál, sum hevur verið stýrandi fyri SEV og landsstýrið, men sum nú er linkað og seinkað, tí tíðarætlanin við pumpu- og goymsluskipan til vatnorku í Vestmanna, ikki heldur. Eisini má staðfestast, at tað gongur striltið at halda tíðarfestu útbyggingarætlanina, sum Umhvørvisstovan og SEV mæltu til og sum landsstýrið tók undir við í 2023. Orsakirnar eru helst fleiri: tíðarfestingarnar hava verið ov bjartskygdar, almenn orkuútboð krevja stinna samskipan og fyrireikingar, og hædd má takast fyri, at til ber hjá umsøkjarum og øðrum at kæra avgerðir í einum rættarsamfelagi sum okkara. Tí verður eisini neyðugt at dagføra orkuútbyggingarætlanina. Lógaruppskotið leggur upp til, at tíðarfestu virkisætlanirnar verða dagførdar fimta hvørt ár, heruppií orkuútbyggingarnar.

Verður hugt at seinna Orku- og veðurlagspolitikkinum frá 2022, so hevur hesin trý ár á baki. Higartil eru umleið 18 av 25 tíðarfestum átøkum sett í verk. Hesi eru fyri tað mesta sett í verk sum lógarásett krøv, fyrisitingarlig krøv og meiri fjøltáttaðar prísskipanir hjá SEV. Írestandi átøkini skulu fremjast í 2025 ella skjótast gjørligt. Úrslitini og virknaðurin av framdum átøkum síggjast ikki altíð beinanvegin, men glið tykist at verða komið á grøna orkuskiftið viðvíkjandi upphiting av bygningum, útlát frá ferðslu á landi, minni oljunýtslu í elframleiðsluni á landi og minni olja til fiskiskap. Innflutningur, nýtsla og útlát av F-gassi, sum eru sterk vakstrarhúsgass og mest brúkt innan frost- og køliskipanir, skulu sambært nýggjari lóggávu eisini minka stigvíst niður í 15 prosent ár 2036.

Grøna orkuskiftið hevur seinastu 20 árini einamest verið á landi. Elorka frá vindmyllum, biogassi og sól hava, saman við munandi elektrifisering av upphiting og ferðslu, givið eina árliga sparing í innflutningi av olju á umleið 40.000 tons sum svarar til eina minking á umleið 10 prosent. Staðfestast má, at enn er langt eftir á mál, skulu vit røkka langtíðarmálinum um netto null útlát í 2050, soleiðis sum Parísavtalan, IPCC og hetta lógaruppskotið leggja upp til. Við lógini taka Føroyar eitt týðandi stig at vísa, at politiskur vilji er handan altjóða bindingar Føroya, og miðvísar virkisætlanir verða lagdar til rættis fimta hvørt ár at røkka málinum.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Veðurlagslógin verður ætlandi karmur um framtíðar orku- og veðurlagspolitikk, framsøknar virkisætlanir og ítøkilig átøk at røkka settum málum. Eisini verður lógin eitt høvi at vísa umheiminum, at Føroyar taka sínar skyldur eftir Veðurlagssáttmálanum og Parísavtaluni í álvara.

At røkka langtíðarmálinum krevur eitt orkuskifti á landi og sjógvi. Á landi eru fleiri skjótt syftir seiðir, meðan tunga takið fyrst og fremst er á sjónum. Nógvar framkomnar og framfýsnar fyritøkur arbeiða dúgliga við tøkniligari menning innan skipaflotan og aðrar vinnur á sjónum. Kortini má staðfestast, at tað fer at taka nógv ár at nútíðmansgera og fremja grønt orkuskifti í flotanum av skipum og bátum undir føroyskum flaggi.

Endamálið við veðurlagslógini er at seta ítøkilig mál at minka útlátið av vakstrarhúsgassi samsvarandi altjóða bindingum Føroya sambært Veðurlagssáttmálanum og Parísavtaluni og at tryggja, at vit sum samfelag megna at tillaga okkum til veðurlagsbroytingarnar í tøkum tíma.

Lógin verður karmur um politiska arbeiðið hjá komandi landsstýrum, tí tað verður politiska skipanin, sum skal útinna lógina í verki, til vit røkka á mál. Lógin eyðmerkir ikki, hvussu langtíðarmálið skal røkkast, men ásetur, hvat langtíðarmálið er. Hvussu langtíðarmálið skal røkkast, og hvussu skjótt orkuskiftið skal ganga, er eitt politiskt mál, har eitt nú støða má takast til, hvussu nógv átøk skulu setast í verk í senn, hvørji tey skulu vera, osfr.

Fyri at fáa eina skynsama tilgongd er ásett, at fimta hvørt ár skulu nýggj og dagførd mál setast at minka útlátið av vakstrarhúsgassi við ávísum prosenttali fyri næsta 10 ára tíðarskeið. Saman við tí skal ein virkisætlan gerast við ítøkiligum átøkum at minka útlátið av vakstrarhúsgassi. Flest øll munnu vera samd um, at ikki ber til at bíða til síðstu løtu at seta tiltøk í verk, sum flyta Føroyar burtur frá oljuni. Skipanin við tíðarfestum virkisætlanum skal tryggja, at orkuskiftið verður framt í tøkum tíma og so skynsamt og smidliga, sum til ber. Orkuskiftið má framhaldandi leggjast soleiðis til rættis, at vit fáa sum mest fyri hvørja krónu, sum landið, kommunurnar, feløg og einstaklingar brúka til umleggingina innan allar geirar í samfelagnum.

Málið um netto null útlát av vakstrarhúsgassi ár 2050 merkir, at nationala útlátið netto ikki má verða størri enn natúrliga upptøkan av vakstrarhúsgassi í eitt nú viðarvøkstri og vátlendi. At endurbøta oyðiløgd vátlendi vil økja um upptøkuna. Føroyar hava eitt stórt og ríkt havumhvørvi, sum upptekur nógv CO2. Av tí at upptøkan ikki er mannaskapt ber ikki til at mótrokna upptøku av CO2 í havinum. Hinvegin áliggur ein týðandi skylda á heimsins londum at fyribyrgja dálking av havumhvørvinum, so at eginleikarnir og evnini hjá havinum at upptaka CO2verða varðveitt. Tað snýr seg bæði um at fyribyrgja, at havið gerst súrari, og at lívfrøðiliga upptøkan versnar. Hetta svarar til skylduna hjá øðrum londum, sum hava regnskóg, mangroveskóg, o.tíl., at verja slík skógarøki móti inntrivum.

Eitt annað endamál við lógini er at seta eitt veðurlagsráð. Veðurlagsráðið skal mannast við óheftum serfrøðingum. Veðurlagsráðið fær tilmælandi uppgávur til politisku skipanina, men ikki avgerðarheimildir. Eitt veðurlagsráð er ikki eitt fyrisitingarligt stjórnarráð, men er samansett við serfrøðingum, hvørs uppgáva verður at greina, leiðbeina og gera tilmæli um veðurlagspolitisk átøk og at varpa ljós á og luttaka í almennum orðaskifti um veðurlagsbroytingar.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Føroyar skulu miðvíst og stigvíst minka útlátið av vakstrarhúsgassi, so tað minkar niður til netto null í seinasta lagi ár 2050. Hetta merkir, at grøna kósin og tilgongdin at minka útlátið skal halda fram, og at politiska skipanin í mesta lagi hevur 25 ár at røkka lógarfesta málinum. Á henda hátt taka Føroyar samábyrgd at tryggja komandi ættarliðum somu møguleikar at liva og virka undir, sum vit hava havt, tó á einum meiri burðadyggum og reinorkubúskaparligum grundarlagi, har vit ikki longur dúva á oljuriknar orkuloysnir at reka virksemi í okkara samfelag á.

Veðurlagsbroytingar raka ymiskt alt eftir, hvar í heiminum ein er staddur. At fyribyrgja avleiðingum fyri fólk, fæ og lívfrøðiliga margfeldið má og skal hava hægstu raðfesting. Við dagførdum virkisætlanum fimta hvørt ár skal skipaða tilgongdin tryggja, at útlátið av vakstrar-húsgassi minkar so skjótt og støðugt, sum til ber. Aðalmálið má vera at menna skynsamar og haldførar loysnir, so mest fæst fyri hvørja krónu í umleggingini og í tillagingunum.

Eitt veðurlagsráð við óheftum serfrøðingum skal setast at ráðgeva og gera tilmæli til landsstýrið um, hvørji átøk eru neyðug og hóskandi fyri at røkka málinum. Veðurlagsráðið skal viga og meta, um kós og ferð eru hóskandi, og hvørji átøk eiga at verða sett í verk til hvørja tíð. Umráðandi er, at veðurlagsráðið er óheft og ópolitiskt.

Eisini skal veðurlagsráðið við kunning og upplýsing kveikja áhugan fyri veðurlagspolitiskum spurningum millum manna. Framtíðin hoyrir unga og komandi ættarliðum til, og tí er umráðandi, at veðurlagsráðið eisini megnar at byggja brýr millum ættarliðini fyri at tryggja haldføri í teimum tilmælum, sum verða løgd fyri politisku skipanina.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Í ummælistíðini frá 19. september til 21. oktober 2025 hevur uppskotið ligið alment frammi á hoyringarportalinum hjá landsstýrinum og á heimasíðuni hjá Umhvørvismálaráðnum.

Harumframt fingu hesi uppskotið til ummælis:
Fíggjarmálaráðið
Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið
Uttanríkis- og vinnumálaráðið
Løgmálaráðið
Barna- og útbúgvingarmálaráðið
Almanna- og mentamálaráðið
Fróðskaparasetur Føroya
Umhvørisstovan
Tjóðsavnið
Jarðfeingi
Landsverk
Sjóvinnustýrið, FAS
Vørn
Strandfaraskip landsins
Bústaðir
Kommunufelagið
Felagið Peningastovnar
Vinnuhúsið
Vinnuhúsið, att.: Varandi vinna
Vinnuhúsið, att.: Havbúnaðarfelagið

Vinnuhúsið, att.: Reiðarafelagið fyri handilsskip
Føroya Reiðarafelag
Føroya Náttúru- & umhvørvisfelag
Føroya Fuglafrøðifelag
Ringrás
Veðurlagslóg nú
Meginfelag Føroyskra Studenta (MFS)
Føroya Ungdómsráð (FUR)
Reyði Krossur Føroya
Bóndafelagið
Óðalsfelagið
SEV
MAGN
Effo
Fjarhitafelagið
Brúkarafelagið Skynsamur Fjarhiti

1.6 Samandráttur av innkomnum hoyringarviðmerkingum
Niðanfyri er ein samandráttur av innkomnum hoyringarviðmerkingum og hvørji tilmæli, frámæli og týðandi viðmerkingar hesi hava til uppskotið, sum var í hoyring. Eisini er ein samandráttur av støðu landsstýrisins til hoyringarviðmerkingarnar, sum í stuttum miðsavna seg um hesi evni:

a) langtíðarmálið,
b) deilmál at minka útlátið,
c) virkisætlanir og ráðførsla við onnur,
d) veðurlagsráðið,
e) orkuskiftið og kappingarførar elprísir.

Reyði Krossur Føroya vísir í sínum hoyringarskrivi á, at veðurlagsbroytingar teljast millum størstu avbjóðingar fyri humaniterum arbeiði, tí veðurlagsbroytingar elva til fleiri og størri vanlukkur, flyting av fólki og ótryggleika. Reyði Krossur Føroya tekur undir við lógini og langtíðarmálinum, men saknar stutttíðarmál, sum kunnu tryggja framgongd í at røkka málinum og at hjálparfelagsskapir og sivilorganisatiónir verða tikin við uppá ráð, har landsstýrisfólkið sambært § 4, stk. 2 skal ráðføra seg við "týðandi áhugapartar". Reyði Krossur Føroya mælir til, at ein veðurlagsgrunnur verður settur á stovn, sum kann stuðla tillaging til veðurlagsbroytingar og átøkum sambært veðurlagslógini.

Vilhjálmur Nielsen, DTU Construct vísir í sínum hoyringarskrivi á, at tað er gott at fáa eitt veðurlagsráð at ráðgeva um veðurlagspolitikk og um virkisætlanir at røkka politisku málunum. Mælt verður til, at fjølbroyttu uppgávurnar hjá veðurlagsráðnum eiga at elva til, at ráðið eisini verður mannað við fólkum við førleikum og serkunnleika innan veðurlagsbroytingar og tiltøk at minka um útlátið. Hildið verður, at tað skulu fleiri enn tríggir persónar til at manna ráðið, og at ráðið má hava samfelagsbúskaparliga og byggivísindaliga serfrøði. Mett verður, at fíggjarligi kostnaðurin á 300.000 kr. er undirmettur.

Bakkafrost tekur undir við málinum um netto null útlát í 2050 og grønt orkuskifti, men mælir til, at virkisætlanirnar eru realistiskar og byggja á fakliga og vinnuliga haldførar metingar og altjóða rammur fyri rapportering, so sum TCFD og CSRD , sum eru altjóða standardar fyri, hvussu fyritøkur og fíggingarstovnar kunnu greina, stýra og rapportera veðurlagsváðar. Víst verður á, at grøna orkuskiftið krevur bíliga og støðuga atgongd til elorku úr varandi

orkukeldum, og at útbyggingar og prísáseting av elorku eigur at vera skipað í einum trípartasamstarvi millum landsmyndugleikar, SEV og vinnuna. Harumframt verður mælt til at brúka fíggjarpolitisk stýringsamboð við lánum og stuðli at tryggja, at vinnan kann leggja um frá olju til el uttan at missa kappingarføri. Mælt verður frá at seta veðurlagsráð. Ístaðin verður mælt til at lata orkumyndugleikan ella aðrar fakligar stovnar framhaldandi útinna tað arbeiðið, sum ætlanin er at leggja til eitt veðurlagsráð.

Føroya Náttúru- og Umhvørvisfelag, FNU mælir til, at uppskotið eigur at vera meiri framsøkið við forskriftum og mekanismum, ið gera lógina til eitt bindandi amboð heldur enn eina yvirskipaða politiska ætlan. Ítøkiliga mælir felagið eitt nú til, at deilmál verða sett fyri 2030/2035, sum tryggja, at verulig gongd kemur á at minka útlátið beinanvegin, og at mál skulu røkkast við innlendis minking. Mælt verður eisini til at seta ein veðurlagsgrunn á stovn, sum skal fíggjast við orkuavgjøldum, kvotum og øðrum avgjøldum, og at grunnurin skal fíggja átøk at fremja orkuskiftið og at minka útlát.

Harumframt verður mælt til greiðari uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur, og at árligar frágreiðingar skulu gerast. Mælt verður til at seta fimm limir í veðurlagsráðið umboðandi náttúrufrøði, orkufrøði, samfelagsfrøði, búskaparfrøði og havfrøði. Eisini verður mælt til, at lógin skal staðfesta, at nýggj oljuleiting er í ósamsvari við veðurlagsmálini. At enda verður mælt til, at lendiskanningar verða gjørdar um alt landið fyri at fyribyrgja tvístøður um staðseting í sambandi við útbyggingar av ymsum slagi.

Umhvørvisstovan tekur undir við veðurlagslógini, og at bindandi mál verða ásett. Tikið verður eisini undir við, at eitt óheft veðurlagsráð verður sett við serfrøðingum, sum hava eina breiða bakgrund, sum bæði fevnir um orku-, náttúru- og samfelagslig sjónarmið. Mælt verður til at seta stigvís og tíðarsett mál í lógina, fyri at tryggja betri framdrátt at røkka langtíðarmálinum. Mælt verður eisini til at gera frágreiðingar um gongdina á orku- og veðurlagsøkinum hvørt ella annað hvørt ár, so til ber neyvt at fylgja gongdini við at røkka settum málum.

Fróðskaparsetur Føroya mælir til skjóta minking í útlátinum av vakstrarhúsgassi og at tíðarfest deilmál verða ásett. Mælt verður til at brúka viðurkendu rokni- og uppgerðarhættirnar, sum IPCC hevur ásett, so at bunkringar hjá fremmandum fiskiskipum í Føroyum telja við í føroysku uppgerðini, meðan bunkringar hjá føroyskum fiskiskipum í fremmandari havn ikki telja við. At enda verður mælt frá at avmarka talið av limum í veðurlagsráðnum til trý fólk, tí tað fer eisini at avmarka ráðgevingina munandi innan orkuframleiðslu, el-framleiðslu, landbúnað, fiskiskap, framleiðsluvinnu, infrakervi, samferðslu, húsabygging, o.s.fr. Mælt verður til, at veðurlagsráðið skal kunna keypa sær serfrøði uttanlands, sum vantar innanlands. Mett verður eisini, at ráðnum tørvar óheft fólk í føstum starvi fyri at hjálpa ráðnum at røkja sín arbeiðssetning.

Hiddenfjord tekur undir við bindandi langtíðarmálinum um netto null útlát í 2050, men setur spurnartekin við, hvussu málið skal røkkast og hvussu skjótt orkuskiftið skal ganga. Fýlst verður á, at fyrstu deilmálini og átøk ikki verða løgd fram saman við lógaruppskotinum. Mælt verður til, at vinnan verður tikin við í arbeiðið, tá virkisætlanir verða dagførdar. Av øðrum uppskotum mælir Hiddenfjord til at áseta CO2-gjald, ið verður oyramerkt at fíggja átøk at minka útlátið í teimum geirum, har umleggingar mugu gerast og at skunda undir framleiðslu av eli úr varandi orkukeldum. Mælt verður til, at orkutungar vinnufyritøkur fáa loyvi at framleiða el úr vindi til egna nýtslu, og at yvirskotið kann beinast inn á elnetið hjá SEV móti røttum gjaldi.

Brúkarafelagið Skynsamur Fjarhiti umboðar fleiri enn 1200 húski í Tórshavnar kommunu og tekur undir við endamálinum við lógini. Felagið fýlist á príspolitikkin hjá Fjarhitafelagnum, sum Tórshavnar kommuna og SEV eiga, tí høgi kostnaðurin fyri fjarhita hevur ikki verið grundaður á framleiðslukostnaðin av fjarhitanum. Peningurin í felagnum er ikki komin brúkaranum til góðar, men er brúktur til stórar og dýrar íløgur og víðkan av fjarhitanetinum í kommuni. Víst verður á, at kostnaðurin fyri fjarhita ikki er kappingarførur við oljufýrda upphiting ella aðrar grønar orkuloysnir. Mælt verður til, at endamálsorðingin í lógini eigur at áseta, at livistøðið hjá okkara eftirkomarum ikki versnar orsakað av umleggingum og broytingum, sum eru neyðugar at røkka endamálinum við lógini.

Føroya Reiðarafelag væntar, at uppskotið fer at hava stórar avleiðingar fyri vinnuna og fiskiflotan, tá nýggir politikkir og nýggjar virkisætlanir verða gjørd. Felagið væntar, at fiskiflotin fer at gerast týðandi partur av framtíðar átøkum og vísir á, at so leingi fiskiflotin ikki hevur nakað alternativ til olju, eigur onki CO2-gjald at verða lagt á fiskivinnuna. Felagið vísir á, at verandi Veðurlagspolitikkur ikki hevur nakað boð uppá, hvussu fiskiflotin kann leggja um til grøna orku. At endurnýggja skipaflotan við nýggjum skipum við orkusparandi motorum er týðandi og avbjóðandi, tí reglur um endurnýggjan av veiðirættindum, loyvistíðarskeið, veiðigjøld og útreiðslur til olju eru avbjóðandi fyri fiskivinnuna. Felagið mælir staðiliga til, at framtíðar virkisætlanir og átøk taka hædd fyri umstøðunum hjá fiskiskipunum, og at ongi átøk verða sett í verk uttan hoyring í góðari tíð, har mett er gjølliga um avleiðingarnar fyri fiskiflotan.

Felagið Handilskip tekur undir við, at landið setur framsøkin mál á veðurlagsøkinum og mælir staðiliga til, at krøv til altjóða shippingvinnuna framhaldandi verða ásett í IMO og at ongiserføroysk umhvørviskrøv verða sett hesi vinnu. Felagið ynskir, at hetta kemur týðiliga fram í lógaruppskotinum, og at hetta eisini verður virt av veðurlagsráðnum. Annars tekur felagið undir við átøkum um landstreym til skip, sum eigur at verða raðfest hægri at minka útlátið frá skipum.

Effo gleðist um stóru ætlanirnar og ynskir at verða ein viðspælari í grøna orkuskiftinum. Felagið fýlist á, at fylgjurnar av uppskotinum ikki eru búskaparliga skynsamar, um øll olja á landi og sjógvi longu skal verða skift út við aðra orkukeldu um 25 ár. Effo metir, at orkuskiftið á landi og á sjónum verður eitt tungt tak, sum samanlagt krevur íløgur fyri umleið 18 milliardir krónur. Effo vísir á, at orkuskiftið á landi er meiri einfalt at fremja, hóast tað gongur nakað seint. At almennar stuðulsskipanir í mong ár hava skundað undir skiftið til elriknar hitapumpuskipanir og elbilar, og kortini verður tað neyvan fyrr enn ár 2040, at allir bygningar hava grønar hitaskipanir og ár 2050, at akfør ikki brúka bensin og diesel. Mett verður, at íløgur fyri umleið 9 milliardir krónur skulu gerast, fyri at øll orkan á landi skal koma úr el ár 2050. Mælt verður til, at tá tað snýr seg um skipaflotan er frægast at fylgja mál og markviði, sum IMO ásetur, og so heldur hugsavna seg um orkuskiftið á landi. At enda mælir Effo til, at vinnulívið fær umboð í veðurlagsráðið.

Tórshavnar kommuna tekur undir við uppskotinum, men saknar at bindandi stutttíðarmál eisini verða sett í lógina og at víst verður til IPCC í mun til, hvussu útlátið av vakstrarhúsgassi skal gerast upp. Eisini vísir kommunan á, at virkisætlanirnar eiga at byggja á modelleringar, dáta og óheftar kanningar, og tí tørvar veðurlagsráðnum eisini størri játtan, ella má onnur játtan útvegast eftir tørvi til neyðugt greiningararbeiði. Mælt verður til, at Kommunufelagið kann peika út lim til veðurlagsráðið, tí kommunurnar hava týðandi leiklut at røkka málunum í lógini. Mælt verður eisini til, at kommunurnar kunnu fáa stuðul og vegleiðing til at seta grøn átøk í verk, so sum landstreym til skip, grøna ferðslu og endurnýtsluverkætlanir.

Kommunufelagið hevur sum einastu viðmerking ynski um, at eitt av teimum trimum umboðunum í veðurlagsráðnum verður tilnevnt av kommununum, tí kommunurnar eru staðbundnir umhvørvismyndugleikar við avgerandi leiklutum í veðurlagsátøkum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag og netverkið Varandi Vinna vísa í felag á, at tað er gott, at landið setur framsøkin mál og at kappingarførið hjá vinnuni má tryggjast við atgongd til bíliga og varandi elorku. Fýlst verður á, at ov lítið frambrot sæst í at røkka settum málum, og at orkuskiftið stendur í stað. Felagið setur eisini spurnartekin við, um tað ger nakran mun at samtykkja eina veðurlagslóg, har landsstýrisfólkið fær so avmarkaðar heimildir. Mælt verður til, at ráðførsla má vera við vinnuna, tá virkisætlanir verða gjørdar, og at tað er týðandi at eftirmeta úrslitini av teimum einstøku átøkunum, sum verða sett í verk. Mælt verður til, at regluligar frágreiðingar verða gjørdar, og at tær verða lagdar til aðalorðaskifti í Løgtinginum. Mælt verður eisini til, at deilmál verða sett og rokkin við átøkum, har størst útlátsminking fæst fyri hvørja krónu. Víst verður á, at orkuskiftið er ein samansett uppgáva, sum krevur samstarv millum allar partar. At enda verður mælt frá at seta eitt veðurlagsráð og heldur styrkja verandi orkumyndugleika og almennu stovnarnar, sum longu røkja fleiri av uppgávunum, sum eru ætlaðar veðurlagsráðnum. Eru ivamál, ber til at leita sær ráð frá privatum serfrøðingum.

Jarðfeingi tekur undir við uppskotinum og endamálsorðingini og mælir til at styrkja uppskotið við kravi um, at deilmál verða sett, og árligar støðufrágreiðingar gjørdar, so virksemið kring veðurlagslógina gerst sjónligt í samfelagnum. Eisini verður mælt til at seta mál um, at orkukostnaðurin skal lækka, eitt nú við bíligari orkuframleiðslu og effektivari orkubrúki. Mælt verður eisini til at geva landsstýrisfólkinum heimild at áseta kunngerðir, so eitt nú gjøld kunnu ásetast ella avtakast sum stýrisamboð at røkka málunum í lógini. Tikið verður undir við at tilnevna veðurlagsráð, men at ráðnum fer at tørva nógv sløg av serfrøði, og tí eigur lógin at áseta, at veðurlagsráðið kallar serfrøði inn eftir tørvi. Fýlst verður á, at tríggir limir eru ov fáir, og at ráðið í minsta lagi má hava ein fastan fakligan skrivara.

SEV mælir til, at greið ávegis mál verða sett fyri at røkka langtíðarmálium, so alt ikki verður útsett til seinni. Eisini verður mælt til, at SEV fær ein lim í veðurlagsráðið, tí mest sannlíkt fara nógv átøk at ávirka SEV. Eisini metir SEV seg hava nøktandi serfrøði til at sita í ráðnum. Harumframt hevur SEV ymsar málsligar og innihaldsligar viðmerkingar til ávís reglubrot og orðingar í viðmerkingunum til lógina.

Havbúnaðarfelagið, Uttanríkis- og vinnumálaráðið og Barna- og útbúgvingarmálaráðið hava ongar viðmerkingar til uppskotið.

1.7 Samandráttur av støðu landsstýrisins til hoyringarviðmerkingarnar

Niðanfyri er ein samandráttur av støðu landsstýrisins til innkomnu hoyringarviðmerkingarnar.

a) Netto null útlát ár 2050

Breið undirtøka er fyri langtíðarmálinum um netto null útlát av vakstrarhúsgassi ár 2050, sum eisini er í samsvari við tilmælið frá IPCC og Parísavtaluna, sum Føroyar hava tikið undir við. Tað eru tó fleiri lond, sum hava meldað út, at tey ætla at framskunda at røkka málinum um netto null fyrr. Hesin spurningur hevur eisini verið viðgjørdur her heima, men avbjóðingarnar við skipaflotanum elva til, at ikki verður mett skynsamt og realistiskt hjá Føroyum at framskunda langtíðarmálið.

b) Deilmál fram til ár 2050

Hoyringarsvarini eru mest sum á einum máli um, at skilagott er at seta deilmál at minka útlátið fyri at tryggja, at veruligur framdráttur er í arbeiðinum at røkka langtíðarmálinum um netto null ár 2050. Arbeitt hevur verið við slíkum deilmálum fyrr, men ætlanin við deilmálum er slept og í staðin gerast deilmálini partur av teimum virkisætlanum, sum skulu dagførast fimta hvørt ár. Virkisætlanirnar fara at seta framsøkin mál um at minka útlátið av vakstrarhúsgassi næstu 10 árini og at áseta tíðarfest átøk, sum skulu fremjast næstu fimm árini fyri at røkka setta málinum. Á henda hátt verður tryggjað, at deilmálini byggja á eitt haldgott og upplýst grundarlag og á tað støði, sum samfelagið tá er á. Hetta ger lógina dynamiska og gevur skiftandi landsstýrum rásarúm til at seta framsøkin og realistisk mál fimta hvørt ár fyri at røkka langtíðarmálinum. Sambært Parísavtaluni er tað longu eitt krav, at málini skulu gerast alsamt meiri framsøkin fyri hvørji fimm ár. Hetta merkir, at ikki ber til at bakka, tá eitt ávíst prosenttal er staðfest í einari virkisætlan og er fráboðað Veðurlagsskrivstovu Sameindu Tjóða sum tað føroyska málið at minka útlátið av vakstrarhúsgassi eitt ávíst fimm ára tíðarskeið, eitt sonevnd NDC, National Determined Contribution.

c) Virkisætlanir og ráðførsla við onnur
Fleiri seta fram ynski um ráðførslu við landsstýrið í sambandi við, at virkisætlanir verða gjørdar fimta hvørt ár. Landsstýrið tekur undir við hesum ynski.

Landsstýrið ætlar, at landsumsitingin støðugt skal arbeiða við implementering av galdandi virkisætlan. Hetta merkir stutt at fyrireika lóggávu, fyrisitingarligar mannagongdir, gera fyrireikingar- og greiningararbeiði, savna inn dátur og hagtøl, fáa ymsar partar í samfelagnum at taka lut í implementeringini, fylgja gongdini av framdum átøkum o.s.fr. Afturat hesum skulu framd átøk regluliga eftirmetast og metast skal um tørvin á nýggjari og dagførdari virkisætlan.

Í hesum tilgongdum er tað upplagt at taka viðkomandi partar við uppá ráð, bæði í mun til eftirmeting og í mun til nýggjar virkisætlanir, sum innihalda átøk, ið raka virkisøki hjá kommunum, vinnulívi, felagsskapum, einstaklingum o.s.fr. Eftir ætlan verður ráðførsla hildin so hvørt, sum arbeitt verður við ymisku evnunum og áðrenn, at nakað endaligt uppskot verður lagt fram til politiska støðutakan í landsstýrinum ella í Løgtinginum.

d) Veðurlagsráðið
Mest sum øll taka undir við, at eitt veðurlagsráð verður sett. Tó eru nøkur, sum ynskja sær umboðan í veðurlagsráðið og fleiri, sum halda, at veðurlagsráðnum tørvar fleiri enn tríggjar limir, tí uppgávurnar eru nógvar og fjølbroyttar. Eisini verður víst á, at veðurlagsráðnum tørvar eina fakliga umsiting og sannlíkt størri játtan. Hesum tekur landsstýrið partvíst undir við.

Landsstýrið hevur tikið undir við at broyta grein 5, stk. 2, so tað kunnu sita minst trý og í mesta lagi fimm umboð í veðurlagsráðnum. Mett verður, at tað er óneyðugt at áseta reglur um, at veðurlagsráðið kann leita upp og keypa sær ráðgeving frá øðrum fyri at útinna sín arbeiðssetning.

At leggja skrivstovuhaldið til Umhvørvisstovuna er júst gjørt fyri at tryggja veðurlagsráðnum eina fakliga umsiting. Umhvørvisstovan hevur nógvar dátur, greiningar og tilfar, sum stovnurin antin sjálvur hevur framleitt ella hevur heitt á onnur um at framleiða. Eisini hevur Umhvørvisstovan innlit í og atgongd at rúgvismiklum tilfari, sum er framleitt undir norðurlendska ráðharraráðnum og aðrastaðni. Tilfar og greiningar, sum stovnurin kann útvega veðurlagsráðnum at brúka í sínum arbeiði. Um játtanin fer at vísa seg at vera ov lítil, mugu landsstýrið og Løgtingið taka støða til tað.

Landsstýrið vil ikki ganga frá ásetingini um, at veðurlagsráðið skal vera óheft og ópolitiskt. Áhugapartarnir í samfelagnum fáa góðar sømdir at koma til orðanna, tá virkisætlanir verða dagførdar, og hvørja ferð einstøk átøk, sum viðvíkja teimum, verða viðgjørd. Ráðførsla við landsstýrið í góðari tíð kemur umframt vanliga rættin at verða hoyrd, sum er øllum tryggjað í sambandi við, at lógir og kunngerðir verða smíðaðar og sendar í hoyring.

e) Orkuskiftið og kappingarførir elprísir
Fleiri vísa á, at orkuskiftið fer at kosta nógv, og at tað er umráðandi, at fíggjarlig stýringsamboð verða brúkt at tryggja kappingarførið hjá vinnuni í umleggingini, og at livistøðið í Føroyum ikki lækkar orsakað av umleggingini. Landsstýrið tekur partvíst undir við hesum.

Landsstýrið ætlar framhaldandi at brúka fíggjarlig stýringsamboð at røkka langtíðarmálinum á ein fyri samfelagið skynsaman hátt, har sum mest fæst fyri hvørja krónu, ið verður brúkt til umleggingar og orkuskiftið í breiðari merking. Umráðandi er, at útbyggingar av elkervinum og útbyggingar av elframleiðsluni úr varandi orkukeldum ganga hond í hond við elektrifiseringini innan allar geirar í samfelagnum. Nakrir geirar standa fyri størri avbjóðingum enn aðrir, og summi hava betri ráð at leggja um enn onnur. Uppaftur onnur mugu leggja um skjótt, meðan onnur tola at bíða eitt sindur. Umráðandi er at seta skynsemi í hásætið og bæði hyggja stutt og langt fram í tíð, tá virkisætlanir og átøk skulu leggjast til rættis komandi árini.

Politiska avbjóðingin verður at smíða skipanir, sum í tøkum tíma fremja tey átøk, sum undirtøka er fyri í teimum virkisætlanum, sum verða gjørdar fimta hvørt ár. Í summum førum verður talan um at stimbra við fíggjarligum lættum ella fíggjarligum gjøldum, alt eftir hvat verður mett mest skynsamt sum stýrisamboð. Umráðandi er at smíða haldførar skipanir, sum ikki verða broyttar í tíð og ótíð. Tey flestu ynskja fíggjarligar lættar í orkuskiftinum, meðan bert tey fáu mæla til CO2-gjald ella oljugjald. Kortini eru tað eisini fleiri, sum skjóta upp, at eitt CO2-gjald verður ásett fyri at skaffa landskassanum inntøkur at brúka til at fíggja umleggingina í samfelagnum, so hin einstaki borgarin og vinnulívið ikki merkja fíggjarligan sviða av grøna orkuskiftinum.

At áseta CO2-gjald er longu viðmælt í galdandi orku- og veðurlagspolitikki, men spenta støðan á orkumarknaðinum, sum kom í kjalarvørrinum á innrásini í Ukraina í 2022 gjørdi, at Rættarnevndin í Løgtinginum mælti til at útseta málið um at áseta CO2-gjald í eini tvey ár. Hesi ár eru nú farin afturum og mett verður, at spurningurin um at áseta CO2-gjald eigur at takast fram aftur. Orkuskiftið í Føroyum kostar, og tað ger tað eisini í øllum øðrum londum. Men tað kostar eisini, ikki at leggja um.

At enda verður hildið, at bygnaðarligi skilnaðurin í SEV, har elnetið og skipanarberandi tænasturnar eru skild sundur í egið felag frá framleiðslu- og sølupartinum, sum er kappingarútsett virksemi, fer at gera tað lættari at fremja gjøgnumskygni í prísskipanum hjá SEV. Í øllum førum fara prísirnir hjá SEV av at eiga og reka elnetið og raksturin av skipanarberandi tænastum at síggjast aftur í elprísunum til kundaskaran, har prísurin fyri elframleiðsluna eisini fer at vera ymiskur, alt eftir hvussu nógv olja er brúkt í elframleiðsluni. Arbeitt verður við at menna nýggjar prísskipanir, sum í nógv størri mun fara at eggja elkundum at brúka ta bíligaru grønu elorkuna, í tíðarskeiðum, tá hon verður framleidd. Á henda hátt kann SEV framleiða og gagnnýta størri partar av elframleiðsluni, sum ikki stavar frá olju.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Ikki ber til at meta um fíggjarligu útreiðslurnar, sum framtíðar veðurlagsátøk fara at hava við sær fyri land og kommunur, fyrr enn átøkini verða ítøkiliggjørd í framtíðar virkisætlanum um minking í útlátinum av vakstrarhúsgassi. Hinvegin kann staðfestast, at grøna orkuskiftið hevur viðført, at árligi innflutningurin av olju higartil er minkaður við 40.000 tonsum. Staðfestast kann eisini, at enn restar nógv í at fullføra grøna orkuskiftið, tí sambært tølum frá Umhvørvisstovuni eru bara umleið 10 prosent framd.

Heldur ikki ber til at greiða frá, hvørjar fíggjarligar avleiðingar komandi virkisætlanir um at minka útlátið av vakstrarhúsgassi fara at hava fyri fyritøkur, einstaklingar, ávísar samfelagsbólkar og onnur. Mest sum øll komandi orkuumlegging verður umgjørd til elloysnir, og soleiðis gerst el fyri stóran part ryggurin í komandi orkurenslinum í samfelagnum. Enn ber heldur ikki til at gera nakra fullfíggjaða lýsing av, hvørji fíggjarpolitisk stýrisamboð verða tikin í nýtslu fyri at hjálpa í umleggingini av samfelagnum afturat teimum, vit longu hava. Hesar avleiðingar verða lýstar, so hvørt nýggjar virkisætlanir verða gjørdar og viðgjørdar.

Hinvegin ber til at meta um beinleiðis útreiðslur, sum standast av hesum uppskotinum. Mett verður, at føstu útreiðslurnar til veðurlagsráðið verða umleið 300.000 krónur árliga. Ætlanin er at útvega játtan á 300.000 krónur á fíggjarlógini. Útreiðslurnar til skrivstovuhaldið hjá veðurlagsráðnum verða hildnar at vera so mikið lítlar, at tær rúmast innanfyri verandi skrivstovuhald hjá Umhvørvisstovuni.

Lógaruppskotið er annars ikki partur av nøkrum samlaðum lógarverki og fær ikki beinleiðis fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Hetta lógaruppskotið hevur tær umsitingarligu avleiðingar fyri land og kommunur, at fimta hvørt ár skulu virkisætlanir gerast við tíðarfestum átøkum at minka um útlátið av vakstrarhúsgassi. Ætlanir, sum partvíst longu verða gjørdar í landsumsitingini, hjá SEV og í summum kommunum.

Kommunurnar verða bodnar við í arbeiðið at umrøða mál og átøk av týdningi fyri at røkka máli Føroya at minka útlátið av vakstrarhúsgassi. Í so máta leggur uppskotið eina ávísa umsitingarliga byrðu á land og kommunur. Mett verður tó, at talan er um natúrligt framhald av tí samstarvi, sum longu er millum landsmyndugleikar, Kommunufelagið og fleiri kommunur í mun til orku- og veðurlagspolitikk Føroya.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Hetta lógaruppskotið hevur ongar beinleiðis avleiðingar fyri vinnuna. Tað er ikki, fyrr enn nýggir politikkir og virkisætlanir verða gjørd, at metast kann um beinleiðis avleiðingarnar av nýggjum átøkum fyri vinnuna. Hinvegin er serliga útflutningsvinnan longu undir trýsti at fremja átøk, sum flyta vinnuna móti meira burðadyggari framleiðslu, og krøvini til skjalfesting av hesum eru eisini vaksandi. Eisini tí er grøna orkuskiftið týðandi fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Í breiðari merking fer uppskotið bara at hava jaligar avleiðingar fyri umhvørvið og lívfrøðiliga margfeldið, tað veri seg heimliga umhvørvið sum altjóða umhvørvið.

Sambært hesi lóg skulu virkisætlanir leggjast við fimm ára millumbilum, har átøk verða løgd til rættis fyri at minka um útlátið av vakstrarhúsgassi, økja um orkuvirknið í samfelagnum, tryggja orkuskifti frá olju til orku úr varandi orkukeldum. Hetta fer at betra um luftgóðskuna í okkara nærumhvørvi og flyta okkum yvir í ein reinorkubúskap, har miðað verður eftir at skilja búskaparvøkstur í samfelagnum og útlát av vakstrarhúsgassi sundur, soleiðis at virksemið í okkara samfelag ikki longur verður tongt at oljunýtslu og brúki av steinrunnum úrdráttum.

Samanumtikið skal eitt grundleggjandi umskifti gerast í samfelagnum, sum fer at skunda undir ein burðadyggari búskap og minni útlát av vakstrarhúsgassi.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur serligar fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella sosialar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Lógaruppskotið skal viðvirka til, at Føroya lúka tær skyldur um minking av útlátinum av vakstrarhúsgassi, sum eru ásettar í ST-Veðurlagssáttmálanum og Parísavtaluni, sum Føroyar hava tikið undir við. Lógaruppskotið er eisini í samsvari við Heimsmálini hjá ST, sum Føroyar hava tikið undir við. Kigali-avtalan um útfasing av HFC-gassi er eisini partur av altjóða skyldum Føroya at minka um útlátið av vakstrarhúsgassi og sum verður framt í verki saman við langtíðarmáli Føroya, sum ásett í hesi lóg.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur serstakan týdning fyri Hoyvíkssáttmálan, Evropeiska mannarættindasáttmálan ella Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi teirra, ið bera brek.

2.9. Markaforðingar
Ongar kendar markaforðingar fylgja við lógaruppskotinum.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um avgjøld og skattir.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki beinleiðis likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Ongar heimildir verða latnar stovnum undir landsstýrinum ella til kommunurnar. Einasta heimild, ið verður latin landsstýrisfólkinum, er heimildin at tilnevna tríggir limir til veðurlagsráðið eftir tilmæli frá Fróðskaparsetri Føroya.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið verður ikki mett at hava aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

Lógaruppskotið stuðlar undir Heimsmálini hjá ST, sum í veðurlagspolitiskum høpi eru at rokna sum týðandi grundvøllur at byggja veðurlagspolitisk átøk á. Fyri Føroyar eru tað serliga heimsmál 7 um burðadygga orkuframleiðslu, mál 8 og 9 um burðadyggan búskaparvøkstur og burðadygga ídnaðarmenning og nýhugsan, mál 11 um burðadyggar býir og búsetingar, mál 12 um burðadygga nýtslu og framleiðslur, mál 13 um at berjast móti veðurlagsbroytingum og avleiðingunum av teimum og mál 14 og 15 um at varðveita og gagnnýta høvini og vistskipanir á burðadyggan hátt og steðga miss av lívmargfeldi.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella lands-myndugleikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingar-ligar avleiðingar	Ja	Ja	Nei	Nei	Nei
Umhvørvis-ligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

Til § 1

Grein 1 ásetur yvirskipaðu veðurlagspolitisku áhugamálini, sum strembað verður eftir at røkka við lógini. Talan er um langtíðar mál og fyrilit, sum eiga at vera ráðandi, tá politikkir og tíðarfestar virkisætlanir verða løgd komandi 25 árini fyri at røkka langtíðarmáli Føroya um at hava netto null útlát av vakstrarhúsgassi ár 2050.

Samhaldsfasta hugsjónin við umheimin í strembanini at skerja alheims útlátið av vakstrarhúsgassi er sjónlig í ásetingini. Eisini er sambindingin við komandi ættarlið staðfest í einari ásannan av, at tað krevur áralong tøk at venda gongdini við útláti av vakstrarhúsgassi og at tálma veðurlagsbroytingunum.

Tað, at lógin ásetur bindandi veðurlagsmál fyri Føroyar, merkir, at vit skulu taka globala samábyrgd og handla lokalt. Vit skulu stutt sagt:

- tálma útlátinum av vakstrarhúsgassi, so tað støðugt minkar komandi 25 árini, har vit miða eftir at gerast leys av olju og øðrum úrdrátti, sum hava við sær útlát av vakstrarhúsgassi
- verja lívfrøðiliga margfeldið á landi og sjógvi fyri at betra mótstøðuførið móti veðurlagsbroytingum
- tillaga okkara samfelag og virksemi til broyttar umstøður vegna veðurlagsbroytingar, og
- taka hædd fyri áhugamálum og tørvi hjá yngri og komandi ættarliðum, tá politikkir og virkisætlanir verða løgd fyri at tryggja komandi ættarliðum somu kor og møguleikar, sum eldru ættarliðini hava havt

Greinin hevur bæði eitt yvirskipað alheimsfokus og fokus á heimliga umhvørvið. Orsøkin er, at henda lóg byggir á altjóða skyldur Føroya sambært Veðurlagssáttmálanum hjá ST, sum Løgtingið hevur tikið undir við og á Parísavtaluna, sum í 2015 varð samtykt sum eitt løgfrøðiliga bindandi ískoyti til Veðurlagssáttmálan, og sum landsstýrið tók undir við í 2016.

Tað er serliga í kjalarvørrinum á Parísavtaluni, at lond eru farin at samtykkja veðurlagslógir fyri at sjónliggera, at politiska skipanin tekur alheims veðurlagsbroytingar í stórum álvara, og at londini taka samábyrgd av ikomnu støðuni við at áleggja sær sjálvum framsøkin mál at minka útlátið av vakstrarhúsgassi. Hetta viðvirkar til, og økir sannlíkindini fyri, at minka skaðiligu avleiðingarnar av veðurlagsbroytingum, sum á ymsan hátt raka lond og øki kring allan heimin.

Í Føroyum er eisini breitt ynski um at gera tað, vit megna, fyri at taka samábyrgd at minka útlátið av vakstrarhúsgassi, tí tað er eintýtt staðfest av altjóða veðurlagsnevndini IPCC, at mannaelvda útlátið av vakstrarhúsgassi er høvuðsorsøk til, at heimurin hitnar, og at lívfrøðiliga margfeldið gerst fátækari. Ódnir, glopraregn, turkur, oyðumarkagerð, hitaøking, ógvusligt veður yvir lond og høv, ísbræðing o.tíl., eru bara nakrar av broytingunum og avleiðingunum, sum heimsins lond longu merkja sviðan av. Fyri mong hevur hetta longu fingið vanlukkuligar fylgjur og serliga fyri fólk, sum búgva í londum tætt við ekvator. Veðurlagsfløttar eru vorðin ein veruleiki. Í nógvum londum ávirka veðurlagsbroytingar lívfrøðiliga margfeldið so nógv, at fólk í hesum londum hava mist sítt tilverugrundarlag. Bæði vatntrot, ódnarveður og vatnflóð hava oyðileggjandi avleiðingar fyri lond, fólk og djóra- og plantulív runt um í heimi.

Flest øll munnu vera samd um, at vit mugu gera okkara ítasta fyri at komandi ættarlið fáa somu góðu kor at liva og virka undir, sum vit hava fingið í arv frá okkara forfedrum. At valmøguleikarnar hjá komandi ættarliðum ikki fækkast í mun til teir valmøguleikar, sum vit hava havt. Ongin ynskir, at børnini skulu arva ein heim, sum er fátækur í lívfrøðiligum margfeldi, veðurbardur og óstøðugur, so tað ikki er liviligt hjá fólki, djóra- og plantulívi. Ynskiligt er, at náttúrugivna grundarlagið undir ríkidømi Føroya verður óskert, hóast veðurlagsbroytingar longu vísa seg.

Tí er ásett í § 1, stk. 1, nr. 3 at vit mugu styrkja okkara mótstøðuføri og seta sjóneykuna á viðurskifti, sum kunnu gera okkum betur før fyri at tillaga okkara samfelag til veðurlagsbroytingar. Tað snýr seg bæði um vistskipanir á landi og sjógvi og um bygningar, havnir, vega- og undirstøðukervið og alt annað, sum er týðandi fyri virksemið í samfelagnum.

Ætlanin er, at grein 1 skal vera karmur um ta kós, sum veðurlagspolitikkurin framhaldandi skal mennast á fyri at røkka mál Føroya at minka útlátið av vakstarhúsgassi komandi árini. Kósin skal vera greið og framsøkin, har vit við heimligum átøkum eftir førimuni taka samábyrgd við umheimin fyri at røkka felagsmálinum um at minka og steðga útlátinum av vakstrarhúsgassi fyri at tálma alheims veðurlagsbroytingum.

Langtíðar mál og mið um framburð og búskaparvøkstur í okkara samfelag eigur frameftir at byggja á loysnir, har alt virksemið, øll framleiðsla og øll orkunýtsla verður flutt burtur frá olju og steinrunnum úrdráttum og til reina orku, sum er framleidd úr varandi orkukeldum, samstundis sum fokus eigur at verða sett á orkuvirkni, minni oyðsl og meiri endurnýtslu. Okkara veðurlagsmál eiga at vera so mikið framsøkin, at til ber at tryggja komandi ættarliðum somu góðu umstøður at liva og virka undir, sum vit og undanfarin ættarlið hava havt.

Til § 2
Langtíðarmál Føroya eru ásett í grein 2. Hetta er fyrstu ferð, at eitt ítøkiligt langtíðarmál um at minka útlátið av vakstrarhúsgassi við lóg er sett fram til politiska støðutakan í Løgtinginum. Netto null útlát merkir, at í 2050 skal útlátið av vakstrarhúsgassi, mótroknað tær CO2-nøgdir, sum eitt nú viðarvøkstur og vátlendi kann upptaka, samanlagt geva null.

Árliga verður útlátið av vakstrarhúsgassi hjá Føroyum uppgjørt sambært tí felags leisti, sum IPCC hevur ásett. Sum er, telur skógarlendi, mangroveskógir, vátlendi o.a. lendi við í roknistykkinum yvir, hvussu nógv CO2 verður bundið í lendi og plantuvøkstur kring heimin, tá útlátið og upptøkan eru mannaskapt. Heimshøvini upptaka størsta partin av CO2. Stórt fokus er tí á at verja og varðveita lívfrøðiliga margfeldið og vistskipanirnar í heimshøvunum, so at havið framhaldandi varðveitir sínar lívfrøðiligu givnu fortreytir at upptaka CO2. Hetta fokus veksur nógv í hesum árum, tí virksemið og áhugin at troyta livandi sum ikki livandi tilfeingi í sjónum veksur stútt við øktum váða fyri at lívfrøðiligt margfeldi og vistskipanir í havinum verða hótt, trokaði burtur ella ofrað, samstundis sum at økt virksemi elvir til økt útlát og økta dálking.

Tað áliggur okkum tí ein serstøk skyldu at tryggja, at havøkini kring Føroyar ikki verða dálkað ella koma undir slíkt trýst, at evnini til at upptaka CO2 skeiklast ella minka í okkara havumhvørvi.

Føroyar hava týðandi áhuga í, at hitalagið ikki økist, so liviumstøðurnar hjá fólki, fæi, plantu- og djóralívi á landi og sjógvi í minsta lagi verður tað sama komandi árini. Ein stórur partur av

vælferðini í Føroyum byggir á, at vit hava haldførar vistskipanir á landi og sjógvi, sum eru vardar ímóti alt ov stórum broytingum og sveiggjum frá menniskjunnar hond.

Dagførdar forsagnir vísa, at alheimsútlátið av vakstrarhúsgassi helst skal vera netto null væl áðrenn 2050. Megna heimsins lond ikki at minka og steðga útlátið komandi 25 árini má roknast við, at hitalagið á jørðini og upphitingin av sjónum verður enn størri og avleiðingarnar eisini ógvusligari.

Samsvarandi andanum í Parísavtaluni, skal langtíðarmál Føroya fyrst og fremst røkkast við innlendis átøkum og annars gerast í samsvari við altjóða bindingar, sum vit longu hava tikið undir við í altjóða sáttmálum og ískoytissáttmálum. Altjóða sáttmálar og ískoytissáttmálar verða, eins og lógir og kunngerðir, javnan endurskoðaðir og dagførdir og tí má roknast við, at alsamt fleiri krøv fara at koma inn yvir okkum, so hvørt sum veðurlagsbroytingar gerast meiri sjónligar, og samstundis sum at heimurin ikki tekur nóg stór og tung tøk at venda gongdini. Sum dømi kunnu nevnast altjóða krøv um at minka útlátið av sterkum vakstrarhúsgassi sum ozon og HFC-gass og altjóða krøv um at minka útlátið av sóti, olju og øðrum skaðiligum evnum frá skipum og havstøðum.

Føroyar hava atlimaskap í ST sjóvinnufelagsskapinum IMO – International Maritime Organization. IMO hevur samtykt eina røð av altjóða sáttmálum, ískoytissáttmálum, tilmælum og vegleiðingum innan flestu øki, sum hava við skip og altjóða sjóvinnu at gera. Regluverkini, sum verða samtykt í IMO, verða sett í verk í føroyskari lóggávu. Mest týðandi lógirnar eru lóg um trygd á sjónum og lóg um verju av havumhvørvinum og kunngerðir, sum eru settar í gildi við heimild í hesum lógum og sum seta altjóða krøv frá IMO í gildi fyri Føroyar.

IMO hevur eisini samtykt eina sonevnda “GHG-strategy” (GreenHouse Gas). Í hesi ætlan eru mál og tíðarætlanir løgd fyri at minka útlátið av vakstrarhúsgassi frá altjóða skipaferðslu. Hetta merkir, at IMO sum regluásetandi sjóvinnufelagsskapur ger tilmæli og reglur, sum skip í altjóða sigling skulu fylgja fyri at røkka langtíðarmálinum um netto null útlát í 2050. Sostatt verður altjóða skipaferðsla regulerað av IMO í veðurlagshøpi. Tí er týðandi fyri Føroyar at fylgja og dagføra útlátskrøvini til skip samsvarandi krøvunum frá IMO.

Í Føroyum áseta vit somu reglur fyri skip í altjóða sigling, sum eru samtyktar í IMO. Føroyar hava havt atlimaskap í IMO síðani 2001. IMO er eisini farin at gera reglur, hvørs endamál er at minka útlátið av vakstrarhúsgassi frá altjóða skipaferðslu. Harumframt hevur IMO samtykt eina sonevnda Vakstrarhúsgassætlan, VHG-ætlan, um at minka útlátið av vakstrarhúsgassi frá skipum, har langtíðarmálið er at røkka so nær netto null útláti sum gjørligt ár 2050, ájavnt málinum í Parísavtaluni. Afturat langtíðarmálinum, hevur IMO samtykt hesi tíðarfestu mál á leiðini:

- ár 2030 skal útlátið vera minkað við minst 20 prosentum meðan strembast skal móti at røkka 30 prosentum og
- ár 2040 skal útlátið vera minkað við minst 70 prosentum meðan strembast skal móti at røkka 80 prosentum.

Hetta merkir, at skip undir føroyskum flaggi, og sum eru í altjóða sigling, eru javnsett við skip undir fremmandum flaggi, tá tað snýr seg um at minka útlátið av vakstrarhúsgassi frá altjóða skipaferðslu. Øðrvísi er við skipum undir føroyskum flaggi, sum ikki eru í altjóða sigling. Har mugu landsstýrið og Løgtingið áseta krøv til útlát og tillaging til onnur brennievni fyri at røkka mál Føroya um netto null útlát í 2050.

Til § 3
Grein 3 ásetur, at langtíðarmál Føroya um netto null útlát av vakstrarhúsgassi í 2050, skal røkkast við tíðarfestum virkisætlanum, sum verða gjørdar fimta hvørt ár og lagdar fyri tíggju ár í senn. Á henda hátt verður tryggjað, at tíðarfestu virkisætlanirnar í minsta lagi verða endurskoðaðar fimta hvørt ár. Hetta skal styðja undir, at kós og ferð á veðurlagsøkinum verður hildin.

Høvuðsorsøkin til, at arbeitt verður við fimm ára ætlanum er, at menningin av nýggjum framleiðsluháttum og tøkni gongur skjótt, umframt at vitanarstigið veksur í hvørjum. Tí verður mett umráðandi javnan at steðga á fyri at kunna tillaga kós, ferð og átøk til tann veruleika, sum samfelagið er í fyri at tryggja, at okkara mál eru nóg framsøkin, so vit ikki enda á slingrikós ella slaka ferðina.

Politiska skipanin við skiftandi samanseting í Løgtinginum, landsstýrinum og í kommununum má standa saman um framtíðar virkisætlanir at minka um útlátið av vakstrarhúsgassi, skal tað eydnast at flyta Føroyar fram á leið. Ein breið politisk undirtøka er avgerandi fyri at fremja orku- og veðurlagspolitiskar virkisætlanirnar innan allar geirar.

At røkka settum málum í tøkum tíma eru lyklaorð fyri at bremsa og steðga hitaøkingini og fyri at fyribyrgja ógvusligar avleiðingar av veðurlagsbroytingum. Tí eigur fyrivarnisreglan eisini at verða nýtt, tá tíðarfestar virkisætlanir verða gjørdar fimta hvørt ár. Í tilrættaleggingini av orku- og veðurlagspolitiskum átøkum eiga ætlanirnar alsamt at leggja meiri fyri, so málið kann røkkast í seinasta lagi ár 2050, men helst fyrr. Ætlanirnar mugu helst eisini taka hædd fyri, at neyðugt kann vera at gera tillagingar í førum, tá hendingar og viðurskifti koma fyri, sum vit ikki hava valdið á, men sum kortini raka og ávirka okkara samfelag á ein hátt sum ger tillagingar neyðugar. Sum dømi kunnu nevnast vørutrot, hækkandi prísir vegna brádliga ókomnar støður úti í heimi, figgjar- og flutningskreppur, o.s.fr. Tá er umráðandi, at politiska skipanin skjótt kann tillaga virkisætlanir og átøk, so javnvágin millum samfelagsligu umstøðurnar og orku- og veðurlagspolitisku átøkini ikki forferst. Hinvegin er eisini umráðandi at seta ferðina upp á øllum teimum økjum, har tað tøkniliga og figgjarliga longu ber til at gera munandi átøk.

Í stk. 3 er útrokningargrundarlagið ella støðisárið fyri árligu uppgerðina av útlátinum av vakstrarhúsgassi ásett til ár 2010. Umhvørvisstovan ger árliga uppgerðir yvir føroyska útlátið sambært vegleiðing frá IPCC. Øll lond brúka sama leist fyri at tryggja, at útlátið frá øllum heimsins londum, og frá altjóða skipa- og flogferðslu, bara verður gjørt upp og talt við eina ferð, fyri á tann hátt at kunna fylgja við gongdini í samlaða útlátinum í heiminum. Á henda hátt ber til hjá IPCC og øðrum at fylgja við, um heimsútlátið veksur, minkar ella stendur í stað, og hvussu skjótt útlátið broytist. Uppgerðirnar eru eisini grundarlag undir útrokningum, metingum og forsagnum, sum IPCC og aðrir granskingar- og vísindastovnar gera um væntaðu veðurlagsbroytingarnar og teirra avleiðingar. Hesar uppgerðir hava eisini stóran týdning fyri avgerðir, sum verða tiknar í altjóða veðurlagssamstarvinum, sum er skipað við árligum partsfundum, COP, ið er stytting fyri enska heitið “Conference of the Parties”.

Til § 4
Í grein 4 er ásett, at landsstýrisfólkið í veðurlagsmálum fær ábyrgdina at útinna vilja Løgtingsins um at røkka máli Føroya á veðurlagsøkinum. Løgmaður býtir sum kunnugt málsøkini millum landsstýrisfólkini, og tí verður tað landsstýrisfólkið við veðurlagsmálum, sum situr við yvirskipaðu ábyrgdini at útinna skyldurnar eftir hesi lóg. Í hesum liggur bæði

arbeiðið at røkka langtíðar málinum um netto null útlát av vakstrarhúsgassi í seinasta lagi ár 2050 og arbeiðið at leggja og útinna stutttíðar virkisætlanir í komandi tíðum.

Tá Løgtingið hevur samtykt hesa lógina, er langtíðarmálið um minking at rokna sum løgfrøðiliga bindandi. Tó ber ikki til løgfrøðiliga at revsa landsstýrið fyri ikki at røkka langtíðarmálinum ella teimum deilmálum, ið verða sett sum liður í komandi virkisætlanum. Orsøkin er, at lógin ikki inniheldur revsiásetingar. Hetta er í samsvari við altjóða lóggávu, tí hvørki Veðurlagssáttmálin ella Parísavtalan innihalda revsiheimildir til tey lond, sum ikki lúka bindingarnar í sáttmálunum ella røkka ásett National Determined Contribution, NDC, sum er eitt krav sambært Parísavtaluni. Hetta er í samsvari við óskrivaðan fólkarætt og flestu altjóða sáttmálar á umhvørvis- og veðurlagsøkinum.

Staðfestast kann, at eitt altjóða rák tók seg upp í 1970-árunum, har arbeitt varð við at útvega altjóða heimildir at revsa fyri brot á umhvørvissáttmálar, men enn er ongin semja í eygsjón hesum viðvíkjandi. Kortini má roknast við, at tað bæði heimliga og í umheiminum fer at verða hildið eyga við, at arbeitt verður fram móti langtíðarmálinum um netto null útlát av vakstrarhúsgassi ár 2050. Í altjóða høpi kemur tað meira enn so fyri, at lond verða skammaði út av øðrum londum, áhugafelagsskapum o.tíl., tá tey ikki verða mett at røkka teimum veðurlagsmálum, tey hava sagt seg vilja røkka í teirra National Determined Contribution, NDC, sum er fráboðað veðurlagsskrivstovuni hjá ST.

Hóast landsstýrisfólkið í veðurlagsmálum soleiðis mótvegis Løgtinginum fer at sita við evstu ábyrgd at útinna veðurlagslógina í verki, so kann landsstýrisfólkið ikki lúka lógina púra einsamalt. Tey átøk, sum sambært virkisætlanunum skulu fremjast komandi 25 árini, fara at krevja gott samstarv og stev millum fleiri landsstýrisfólk og teirra málsøki, og ikki minst eitt gott tvørgangandi samstarv við kommunur, havnir og vinnuna á landi og sjógvi.

Fyri at tryggja haldbarar loysnir, verður avbjóðingin at slóða fyri breiðum semjum í teimum tíðarfestu virkisætlanunum, sum skulu gerast fimta hvørt ár. Í § 3, stk. 2 er ásett, at hvør virkisætlan skal vera meira framsøkin enn undanfarna virkisætlan. Hetta kravið skal bæði tryggja, at lagdar verða veruleikakendar virkisætlanir og ikki slíkt, sum ikki letur seg fremja í verki, og at talan skal vera um framsøknar ætlanir, sum taka hædd fyri, at aftaná fimm ár skulu uppaftur meiri framsøknar ætlanir leggjast næsta fimm ára tíðarskeið og so frameftir. Hetta eigur at viðvirka til, at virkisætlanirnar bæði eru realistiskar, framsøknar og haldførar, so tær framvegis galda, hóast politiska samansetingin í Løgtinginum, landsstýrinum og kommununum skifta yvir tíð.

Roknast má við, at tað alsamt meiri fer at síggjast aftur í førda fíggjarpolitikkinum, at virkisætlanir verða gjørdar fimta hvørt ár, tí tað eru ikki bara gularøtur og skjótt syftir seiðir, sum kunnu flyta Føroyar burtur frá oljuriknum loysnum og yvir í ein reinorkubúskap. Tað skal harðari kostur til, og tung tøk mugu takast bæði á landi og sjógvi.

At lógin í § 2 ásetur eitt ítøkiligt og bindandi mongdarmál um minking í útlátinum av vakstrarhúsgassi ár 2050, fer ikki at fáa løgfrøðiligar avleiðingar fyri tað landsstýrisfólkið, sum situr í sessinum ár 2050. Fyri tað fyrsta eru ongar revsiásetingar í lógini. Fyri tað næsta liggur tað ikki bara á landsstýrisfólkinum í veðurlagsmálum at tryggja, at átøk verða framd í verki. Virkisætlanirnar fara at raka allar geirar í samfelagnum, og tí verða átøk sett í verk innan málsøki hjá fleiri landsstýrisfólkum og innan kommunala geiran, hvørja ferð nýggjar tíðarfestar virkisætlanir verða gjørdar. Hetta í tøttum samstarvi í landsstýrinum og við kommunala geiran.

Allir geirar í samfelagnum fara at verða ávirkaðir av veðurlagspolitiskum átøkum. Fyri at fyribyrgja andsagnir og óætlaðar avleiðingar av førda orku- og veðurlagspolitikkinum, er umráðandi, at landsstýrisfólkið ráðfører seg við allar týðandi partar, hvørja ferð ein nýggj fimm ára ætlan verður gjørd ella dagførd. Ráðførsla innanhýsis í landsstýrinum er eins týðandi, sum ráðførsla við kommunurnar. Serliga umráðandi er, at førdi fíggjarpolitikkurin stuðlar undir førda orku- og veðurlagspolitikkin. Eisini er umráðandi at kommunurnar og SEV eru við til at gera orku- og veðurlagspolitisk átøk til veruleika í tann mun tað liggur á teimum at fremja átøk til fasta tíð.

Neyvan nakar sleppur undan at gera sítt til, at Føroyar kunnu røkka á mál og tí er eisini umráðandi javnan at seta orð á veðurlagspolitisk átøk, at lýsa positivar sum negativar avleiðingar av teimum og hvat tað fer at krevja av virkjum, fyritøkum, stovnum, kommunum, felagsskapum, einstaklingum og so frameftir. Eisini er týðandi at skapa kjak og varpa ljós á orku- og veðurlagsspurningar, bæði millum ung sum eldri. Evnisdagar, hoyringarfundir, ráðstevnur og kunningartilfar og skúlatilfar, eiga at verða raðfest í árunum, sum koma. Fyriskiparar kunnu eitt nú vera stjórnarráð og stovnar undir landsstýrinum, granskingar- og undirvísingarstovnar, samstørv av ymsum slagi, feløg og vinnugreinar ella vinnulig samtøk o.s.fr. Eisini eigur veðurlagsráðið at upplýsa og kveikja áhuga fyri orku- og veðurlagspolitiskum spurningum.

Føroyar hava seinastu árini tikið virknan lut á partsfundum undir Veðurlagssáttmálanum og Parísavtaluni. Har hava Føroyar eisini møguleika at vísa á veðurlagspolitisk átøk, sum hóska til smá og fjarskotin oyggjasamfeløg. Við tí arbeiði, sum er sett í verk, kunnu vit eftir førimuni verða við til at spjaða vitan og førleikar til onnur lond, sum eru í nøkulunda somu støðu sum vit. Orku- og veðurlagspolitikkur hevur bæði ein heimligan og ein altjóða dám og Føroyar eiga at verða virknar og sjónligar á báðum mótum.

Til § 5

Fyri at tryggja landsstýrisfólkinum í veðurlagsmálum og politisku skipanini í síni heild eitt breitt upplýsingargrundarlag at avgera, hvørji veðurlagspolitisk átøk eru skilabest og mest skynsom at fremja í verki til ymiskar tíðir, verður eitt veðurlagsráð sett á stovn við í minsta lagi trimum og í mesta lagi fimm serfrøðingum. Serfrøðingarnir verða tilnevndir av landsstýrisfólkinum í veðurlagsmálum eftir tilmæli frá Fróðskaparsetri Føroya. Umráðandi er, at veðurlagsráðið verður mannað við óheftum umboðum, sum eru vald fyri sínar førleikar og ikki síni áhugamál ella politiska tilknýtið. At veðurlagsráðið arbeiðir óheft av stakáhugamálum.

Uppgávan hjá veðurlagsráðnum verður stutt sagt at gera tilmæli um veðurlagspolitisk átøk og at rópa varskó, tá mett verður, at førdi politikkurin, tíðarfestu virkisætlanirnar og átøkini frá landsstýrinum elva til ivasom ella óætlað úrslit í mun til at røkka langtíðarmálinum og stutttíðar máli. Veðurlagsráðið fær eisini uppgávuna at kveikja almenn kjak og taka lut á almennum tiltøkum um veðurlagspolitisk evni og spurningar av týdningi fyri Føroyar. Veðurlagsráðið fær rættiliga fritt rásarúm at arbeiða undir og kann taka breið sum smøl atlit við í síni tilmæli og frámæli. Veðurlagsráðið avgerð eisini sjálvt, í hvørjum skapi tilmæli og frámæli verða gjørd. Førleikakrøv eru sambært stk. 2 sett limunum í veðurlagsráðnum, tí tilmælini skulu byggja á fakliga vitan og greiningar og ikki leysar metingar.

Sambært stk. 2 skal veðurlagsráðið mannast við óheftum fólkum, sum eru serfrøðingar innan øki av týdningi fyri at røkka máli Føroya á veðurlagsøkinum. Umráðandi er, at umboðini hava holla vitan innan fleiri ymisk øki. Mett verður, at Fróðskaparsetur Føroya hevur yvirlit yvir, hvørji fólk í Føroyum sum uttanlands verða mett at hava nóg hollar fakligar førleikar til at

verða kandidatar til ein sess í veðurlagsráðnum. Roknað verður eisini við, at Fróðskaparsetrið lýsir og grundgevur fyri, hvørjar fakligar førleikar og dygdir, kandidatarnir verða mettir at hava, tá tilmæli verður latið landsstýrisfólkinum. Sannlíkt verður ráðið mannað við føroyskum serfrøðingum við bústaði í Føroyum ella uttanlands.

Landsstýrisfólkið kann hækka talið av óheftum serkønum fólkum upp í fimm fólk. Høvuðsorsøkin til broytiliga talið er, at tað kann verða neyðugt at tryggja veðurlagsráðnum størri fjølbroytni í serfrøðini, fyri at ráðið kann útinna sín arbeiðssetning innan lógarinnar karm. Eitt nú tí at fokus skal setast á ávís øki í næstu virkisætlan, at nýggj slóðbrótandi tøkni vinnur fram innan orkuframleiðslu, martitima økið ella innan tunga ídnaðarframleiðslu. Heimildin at hækka talið merkir eisini, at til ber at lækka talið av serfrøðingum niður aftur í trý ella fýra.

Av tí at tað er landsstýrisfólkið, sum velur limirnar í veðurlagsráðið, má Fróskaparsetrið skjóta fleiri fólk upp enn talið av sessum í ráðnum. Ynskiligt er, at minst 5-8 limir verða skotnir upp, og at talan er um javnt kynsbýti. Við tilmælinum ber eisini skjótt og lætt til hjá landsstýrisfólkinum at velja nýggjan lim, um onkur limur brádliga fær forfall í styttri ella longri tíðarskeið ella ynskir at taka seg úr veðurlagsráðnum. Limirnir verða tilnevndir fyri fýra ár í senn. Onki er til hindurs fyri, at sama umboð kann tilnevnast meira enn eina ferð. Tað er ikki umráðandi fyri veðurlagsráðið, at øll umboðini altíð verða vald í senn, burtursæð frá fyrstu ferð ráðið skal mannast.

Fyri at tryggja veðurlagsráðnum góðar umstøður at meta um veðurlagspolitisk átøk, kann ráðið eisini kalla serkøn fólk og onnur umboð inn. Veðurlagsráðið skal eftir tørvi og arbeiðsorku greina, lýsa og gera tilmæli um átøk, sum bera fram á leið at lúka bindandi veðurlagsmál Føroya, sum ásett í hesi lóg. Veðurlagsráðið skal í sínum virki taka fyrilit fyri teimum endamálum, sum eru ásett í grein 1 sum karmur um framtíðar orku- og veðurlagspolitisk átøk.

Veðurlagsráðið ger sambært stk. 3 sína egnu starvsskipan, og skal henda góðkennast av landsstýrisfólkinum. Starvsskipanin skal rúmast innan karmarnar av hesi lóg. Roknast má við, at føstu limirnir fáa fasta samsýning. Lógin leggur upp til, at veðurlagsráðið útinnir sítt arbeiði við fundarvirksemi, og at tað er Umhvørvisstovan, sum veitir ráðnum skrivstovuhald og avheldur útreiðslur til almenn tiltøk, upplýsingartilfar og annað tílíkt. Á henda hátt verður veðurlagsráðnum tryggjað eina fakliga sterka umsiting og skrivstovuhald.

Til § 6
Gildiskomuáseting.

Uttanríkis- og mentamálaráðið, 9. desember 2025

Sirið Stenberg
landsstýriskvinna

/ Herálvur Joensen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Ummæli frá Reyða Krossi Føroya
Fylgiskjal 2: Ummæli frá Vilhjálmi Nielsen, DTU Construct
Fylgiskjal 3: Ummæli frá Bakkafrosti

Fylgiskjal 4: Ummæli frá Føroya Náttúru- og Umhvørvisfelag, FNU
Fylgiskjal 5: Ummæli frá Umhvørvisstovuni
Fylgiskjal 6: Ummæli frá Fróðskaparsetri Føroya
Fylgiskjal 7: Ummæli frá Hiddenfjord
Fylgiskjal 8: Ummæli frá Brúkarafelagnum Skynsamur Fjarhiti
Fylgiskjal 9: Ummæli frá Føroya Reiðarafelag
Fylgiskjal 10: Ummæli frá Felagnum Handilsskip
Fylgiskjal 11: Ummæli frá Effo
Fylgiskjal 12: Ummæli frá Tórshavnar kommunu
Fylgiskjal 13: Ummæli frá Kommunufelagnum
Fylgiskjal 14: Ummæli frá Føroya Arbeiðsgevarafelag og netverkinum Varandi Vinna
Fylgiskjal 15: Ummæli frá Jarðfeingi
Fylgiskjal 16: Ummæli frá SEV
Fylgiskjal 17: Ummæli frá Havbúnaðarfelagnum
Fylgiskjal 18: Ummæli frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum
Fylgiskjal 19: Ummæli frá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum